# Ov lítil játtan til eygleiðaraskipanina

**Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at nú eygleiðaraskipanin í NAFO-økinum er vorðin skipað, er neyðugt við størri játtan á fíggjarlógini til hesa uppgávu. – Hava rækjuskipini ikki eygleiðara umborð, sleppa tey sambært sáttmálanum ikki at fiska á Flemmish Kap, sigur hann**

FÍGGJARLÓGIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Støðan hjá rækjuflotanum hevur verið eitt sindur turbulent, og haraftrat kemur, at skipini í longri tíð vóru stongd úti úr kanadiskum havnum. Men nú eru hesi viðurskifti komin uppá pláss aftur, og tað merkir, at neyðugt verður við meira peningi til tess at lúka treytirnar í sáttmálanum, sigur Elmar Højgaard*

Sambært uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2005 verður játtanin til Fiskiveiðieftirlitið ikki skerd í mun til verandi ár. Talan er heldur um eina pinkulítla øking. Hetta merkir tó ikki, at tað verður lætt at reka stovnin innan verandi karmar, tí tað er tungt sum er at fáa endarnar at røkka. Í mun til 2003, er talan tó um eina minking í játtanina, og hetta saman við øktum lønarkrøvum merkir, at stovnurin hevur minni pening at arbeiða við.

## Eygleiðaraskipanin

Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at kontoin, sum fevnir um eygleiðaraskipanina, er ov lítil, og hann ivast í, um myndugleikarnir hava hugsað um, at henda skipan verður dýrari í ár enn undanfarin ár.

– Tað eru so nógv tøl á fíggjarlógini og so nógvar detaljur at hugsa um, at eg velji at trúgva, at myndugleikarnir ikki hava hugsað um, at neyðugt verður við meira peningi á hesi kontoini í komandi ári.

Hann vísir á, at sambært NAFO-reglunum, sum Føroyar eisini hava samtykt at ganga undir, skal eygleiðari verða umborð á hvørjum rækjuskipi, sum fiskar í NAFO-øki á Flemmish Kap.

– Hetta er treytin fyri at sleppa at fiska í økinum, sigur hann.

Elmar sigur, at eygleiðaraskipanin hevur verið ein fyribilsskipan, sum kom í fasta legu fyri góðum ári síðan.

– Støðan hjá rækjuflotanum hevur verið eitt sindur turbulent, og haraftrat kemur, at skipini í longri tíð vóru stongd úti úr kanadiskum havnum. Men nú eru hesi viðurskifti komin uppá pláss aftur, og tað merkir, at neyðugt verður við meira peningi til tess at lúka treytirnar í sáttmálanum.

Hann heldur, at myndugleikarnir – uttan at hava hugsað um hetta – hava sett somu játtan á hesa konto fyri komandi ár sum í ár.

– Eg vóni, at fíggjarnevndin, sum kemur at viðgera uppskotið til fíggjarlóg, tekur hædd fyri hesum.

## 5-6 rækjuskip

Elmar Højgard vísir á, at talan er ikki um tey stóru tølini. Stívliga 1,3 miljónir krónur eru á hesi konto til lønir, men neyðugt verður við umleið tí tvífalda fyri at kunna fylgja NAFO-reglunum.

Rækjuskipini eru í løtuni 5 í tali; tey eru Høgifossur, Napoleon, Sólborg, Havborg og Kappin. Haraftrat plagar Sjúrðaberg, sum annars fiskar tosk, at gera onkran túr á rækjuveiði.

Skipanin í grønlendskum sjógvi er hon, at grønlendingar senda sjálvir sínar eygleiðarar umborð á føroysku skipini.

Eygleiðararnir, sum eru umborð á føroysku rækjuskipunum í NAFO-øki, eru løntir eftir sáttmála, ið lønardeildin hjá landsstýrinum hevur góðkent.

Elmar Højgaard sigur, at Fiskiveiðieftirlitið í næstum fer at gera myndugleikarnar varugar við, at játtanin til eygleiðaraskipanin eru ov lítil.

# Eingin svartkjaftur í føroyskum sjógvi

**Íslendsk og russisk svartkjaftaskip hava leitað í føroyskum sjógvi, men tey eru farin avstað aftur, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Um hesa tíðina í fjør og í fyrraári fingu skipini svartkjaft í føroyskum sjógvi, men higartil í heyst hevur einki verið at fingið. Føroysku skipini eru á makrelveiði*

Eitt sindur ymiskt er ár undan ári, hvussu svartkjafturin ferðast um okkara leiðir.

Um hesa tíðina í fjør og í fyrraári fingu skipini svartkjaft í føroyskum sjógvi, men higartil í heyst hevur einki verið at fingið.

Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at íslendsk og russisk skip hava verið í føroyskum sjógvi og leitað, men tey eru farin avstað aftur.

Føroysku skipini eru á makrelveiði.

## Hjáveiða

Fyrr í summar gjørdi Fiskiveiðieftirlitið nakrar kanningar fyri at finna út av, hvussu stór – ella lítil – hjáveiðan av øðrum fiskasløgum er uppí í veiðini hjá svartkjaftaskipunum.

Tað hevur nevniliga ljóðað, at fitt av toski og upsa hevur verið uppi í veiðini hjá skipum, sum hava fiskað í íslendskum sjógvi.

Síðan kanningarnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum byrjaðu, hevur eingin svartkjaftafiskiskapur verið í føroyskum sjógvi, men stovnurin fer at hava eyguni eftir hesum, tá ið skipini aftur fara at fiska í føroyskum sjógvi.

## Álvarsmál

Nøgdirnar, sum svartkjaftaskipini føra til lands, eru stórar, og hóast hjáveiðan ikki sær út av nógvum, kann talan skjótt verða um hampiligar nøgdir av eitt nú upsa og toski, tá ið saman um kemur.

Kanningarnar, sum Fiskiveiðieftirlitið higartil hevur gjørt, benda tó ikki á, at talan er um tær stóru nøgdirnar av upsa og toski.

Fiskimálaráðharrin, Bjørn Kalsø, hevur sagt, at hann tekur málið um hjáveiði í størsta álvara og hevur biðið um, at hesar kanningar verða gjørdar.




# Punktgjald á sodavatn

## MvG og avgjøld

Vit loyva okkum at vísa á at punktgjaldið uppá sodavatn sum Landsstýrið ætlar at áleggja Föroya fólki, er alt ov högt. (Bert tey 25% MvG er ivaleyst halda vit).

Talvan yvir punktgjald í EU vísir, at bert Danmark hevur eitt avgjald, sum er omanfyri 1 Dkk./ltr. Danmark hevur eisini hægsta MvG, 25% sum vit.

Öll hini londini hava nógv lægri MvG, niður í 3% í Luxenburg, og 7% í Spania.

Bert 5 av 15 av teim gomlu EU londunum hava yvirhövur punktgjald á sodavatni. Hini 4 londini hava frá 0,33 til 0,52 Dkk. pr. litur í avgjaldi.

Hvar man okkara landsstýri hava funnið talið 2,40 Dkk. pr litur?

Vit seta okkara vón til at Föroya Lögting ikki atkvöður fyri hesum uppskoti.

Leskidrykksavgjøld og MvG satsir í EU-15 *(DKK/litur)*

| | Avgjald DKK/litur | MvG í % |
|---|---|---|
| Danmark | 1,15 | 25 |
| Belgia | 0,52 | 21 |
| Holland | 0,41 | 6 |
| Frakland | 0,37 | 5,5/18,5** |
| Finnland | 0,33 | 17 |
| Eysturríki | 0 | 20 |
| Týskland | 0 | 16 |
| Italia | 0 | 20 |
| Grikkaland | 0 | 8 |
| Írland | 0 | 20 |
| Portugal | 0 | 5 |
| Spania | 0 | 7 |
| Ongland | 0 | 17,5 |
| Svøríki | 0 | 12/25* |
| Luxembourg | 0 | 3 |

*Umroknað við útgangsstøði í Evrukursi 7,44
**Handlar / matstovuídnaður

MvG satsir fyri leskidrykkir í EU-15 *(%)*




Föroya Bjór

